# ÚTLOND

SAMBAND
XXXXXX XXXXXXX
XXXXXX@SOSIALURIN.FO
TLF 3418XX

*– Vit kunnu ikki fyribyrgja flogránum, men vit gera okkara besta*

*Daniel Gaultier, Airbus*

# Andstøðan bukað



*Andstøðuleiðararnir í Bangladesh fingu av at vita undir einari kravgongu í gjár. Ætlanin var at ganga kravgongu til skrivstovurnar hjá forsætismálaráðnum við kravi um broytingar í vallógini, men áðrenn mannamúgvan kom so langt, legði løgreglan uppí. Sum myndin vísir, fór løgreglan harðliga til verka, og nakrir av andstøðuleiðarunum vórðu slignir og bukaðir, skrivar Reuters.*

## Nýtt flogfar tryggjað ímóti yvirgangi

**Ein verkætlan hjá BAE og Airbus fer at gera, at tað verður ikki so lætt at ræna ferðamannaflogfør í framtíðini**

Arbeiðið at gera eitt tílíkt flogfar byrjaðu longu beint aftan á atsóknirnar at USA tann 11. september í 2001, og nú eru BAE Systems og Airbus komin so mikið áleiðis, at tær fyrstu royndirnar verða gjørdar um stutta tíð, skriva bretsk bløð.

Tá flogfarið verður liðugt, fer tað at bera til at stýra tí við fjarstýring, og flogfarið kann lenda, sjálvt um eingin flogskipari er. Tað kann vera hent, um yvirgangsmenn taka ræðið umborð á einum flogfari og beina fyri flogskiparanum, soleiðis sum flogræningarnir helst gjørdu tann 11. september, áðrenn teir rendu flogførini inn í World Trade Center og Pentagon.

Í nýggja flogfarinum verða nógvar fjaldar mikrofonir, sum skulu fylgja við tí, sum sagt verður, og myndatól skulu akráseta alt, sum fer fram inni í flogfarinum. Á tann hátt fer tað ætlandi at bera til at avdúka yvirgangsmenn, áðrenn teir ræna eitt flogfar.

– Vit kunnu ikki lova, at vit kunnu rudda vandan fyri flográni burtur, tí tað ber ikki til. Men vit halda tað vera týdningarmikið at siga almenninginum, at vit gera alt, sum gerast kann, sigur Daniel Gaultier, sum stendur fyri verkætlanini.

Hann væntar, at tann nýggja tøknin verður liðug á sumri í 2008, og at øll tann nýggja trygdarskipanin verður klár at taka í nýtslu í 2010.

## Hevna seg inn á skøturnar

**Seinastu dagarnar eru ellivu deyðar tindaskøtur funnar á avstralsku eysturstrondini**

Teir seinastu dagarnar hava myndugleikarnir í Avstralia fingið boð um, at fólk hava funnið deyðar tindaskøtur ymsastaðni fram við eysturstrondini. Fyrradagin vórðu tvær halaleysar tindaskøtur funnar við Deception Bay norðan fyri Brisbane, og í gjár vórðu níggju funnar við Harvey Bay, skrivar blaðið Sydney Morning Herald.

Tað serliga við teimum deyðu tindaskøtunum er, at onkur hevur skorið halan av teimum. Tað hevur fingið myndugleikarnar at halda, at hetta kann hava samband við tilburðin, tá tann kendi náttúru- og sjónvarpsmaðurin Steve Irwin doyði, eftir at ein tindaskøta hevði stungið hann í bringuna.

Vinfólk hjá Steve Irwin ávara fólk ímóti at hevna seg inn á tindaskøturnar.

– Tað er heilt burturvið, og tað hevði Steve heldur ikki viljað, sigur vinmaðurin Michael Hornby.

Onnur halda, at menn hava fangað skøturnar fyri at skera tindarnar av teimum og at selja teir sum minnislutir seinni.

### STUTT SAGT

## Ríkmenn hjálpa Afrika



*Bill Gates letur 380 mió. krónur til menningartiltøk í Afrika*

Amerikonsku ríkmenninir Bill Gates og George Soros hava gjørt av at brúka fleiri hundrað milliónir krónur til ymisk menningartiltøk í Afrika.

Saman við Rockefeller-grunninum hevur Bill Gates gjørt av at brúka 880 milliónir krónur til at menna afrikanska landbúnaðin. Sjálvur rindar Microsoft-stovnarin 380 milliónir krónur. Málið við verkætlanini er at økja úrtøkuna hjá teimum smáu bøndrunum, og tað fer at hjálpa fleiri milliónum afrikanarum burtur úr fátækradømi.

George Soros kunngjørdi í gjár, at hann fer at brúka 300 milliónir krónur til menningartiltøk í londunum sunnan fyri Sahara. Hansara verkætlan umfatar 165.000 fólk í 33 bygdum í 10 londum. George Soros sigur við AP, at verkætlan hansara skal prógva, at tað ber til at hjálpa afrikanarum burtur úr fátækradømi.

George Soros er formaður í The Open Society Institute, sum ígjøgnum árini hevur latið menningarhjálp fyri næstan 30 milliardir krónur.

## Biðja um grið

Tá pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, var í Bruxelles í gjár, fekk hann eina áheitan frá fleiri ES-tinglimum um at ógilda deyðadómin ímóti bretska ríkisborgaranum Mirza Tahir Hussain, sum er dømdur til deyða í Pakistan.

Tann 36 ára gamli Mirza Tahir Hussain varð dømdur til deyða fyri at hava myrt ein hýruvognafórara fyri 18 árum síðani. Upprunaliga skuldi hann takast av døgum í juni, men eftir áheitan frá bretsku myndugleikunum er avrættingin útsett til í oktober.

Tann islamska sharialógin sigur, at drápsmenn kunnu fáa grið, um avvarandi hjá tí myrda góðtaka at geva drápsmanninum grið aftur fyri pengar, men higartil hava tey avvarandi hjá hýruvognsførararanum sýtt fyri at brúka tann møguleikan í lógini.

Mirza Tahir Hussain, sum er ættaður í enska býnum Leeds, bleiv tikin í Rawalpindi í Pakistan í 1988 og ákærdur fyri morð. Hann bleiv dømdur til deyða, men seinni fríkendur í hægstarætti. Men tann úrskurðurin bleiv ógildaður í einum islamskum dómstóli tvey ár seinni.

## Tingingar byrja aftur

Í seinastuni hava norskir semingsmenn roynt at fáa teir stríðandi partarnar í Sri Lanka til samráðingarborðið, og í gjár bleiv kunngjørt, at stjórnin í Colombo og teir tamilsku uppreistrarmenninir hava játtað at senda umboð til Oslo at tingast í næsta mánað.

Umframt norsku semingsmenninar hava umboð fyri ST, ES, USA og Japan roynt at fáa partarnar til samráðingarborðið. Serligi ST-sendimaðurin í Sri Lanka, Yasushi Akashi, sigur við AP, at stjórnin og uppreistrarmenninir hava játtað at tingast uttan at leggja nakrar treytir við. Hann helt tó, at partarnir eiga at vísa góðan vilja við at leggja vápnini alt fyri eitt.

Tað hevur verið ófriðarligt í Sri Lanka í seinastuni, og eina tíð hevur vandi verið fyri, at borgarakríggið skuldi bresta áaftur.